# SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

NÝTT

### Selatrað: Jørð og sethús á Heyggi til sølu





Sethúsini:matr. nr.64c, grundøki 617 m².
Húsini eru í 3. hæddum,grundflada 42 m². Bygd uml. 1850.
Á stovuhæddini: gong, køkur,stova,tvey kømur og wc/brúsa.
Á loftshæddini: Úti á loftinum og tvey kømur.
Kjallarin er óinnrættaður.
Húsini hava nýtt tak og nýggjan ketil/oljufýr.
Húsini liggja frítt fyri, mitt í bygdini og hava vakurt útsýni.
Jørðin: Innangarðs matr. nr. 63, 18 jarðarstykkir/teigar, samlað 10.296 m². Uttangarðs, hagapartur Garðhagi innari, matr.112a samlað 8 gillin og 3 skin, 11 frælsi.
**Verður selt, hús og jørð saman ella hvør sær, um nøktandi boð verður givið**

### Tórshavn: sethús til sølu



Frúðutrøð 16, matr. nr.645u, grundøki 491 m².
Húsini eru í tveimum hæddum, hvør hæddin 116 m².
Stovuhædd: durur, gong, køkur, hjallur, stór stova, hjúnarúm, 2 kømur, wc og baðiverðilsi.
Kjallarahæddin: 2 kømur, vaskirúm, goymslurúm,wc + ein partur av kjallarinum sum hevur verið nýtt til vinnuligt endamál (djóralæknatænasta), er innrættaður við trimum rúmum við egnari inngongd. Húsini bygd í 1965, stoypt grund og klødd við træ. Talan eru um eini stór hús við nógvum møguleikum, liggja sera væl fyri, friðaligt, miðskeiðis í býnum, hava gott útsýni og góðan garð við runnum, liggja lýtt og gott ímun til sólina.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

### Runavík: Stór sethús til sølu



matr.nr. 91, grundøki 638 m².
Húsini, ið eru bygd í 1968, eru í 3 hæddum.
Stovuhædd á uml.129 m² +stórt loft 100 m², stórur kvistur til báðar síður.
Kjallarahæddin uml. 100 m²: gong, fýrrúm,kjallararúm/neyst.
Á stovuhæddini er durur, gong, wc, køkur,skrivstova, stova, vaskirúm, hjúnarúm, wc/bað beinleiðis frá hjúnarúminum.
Loftshæddin:gong, te-køkur, 5 kømur, goymslurúm og baðirúm.
Stórur hjallur er til húsini. Húsini hava stóran urtagarð við runnum, liggja væl fyri, gott útsýni yvir á strandalandið, tætt við fjøruna og havnalagið, vælegnaði til ferðavinnu.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið**

Sosialurin 341800

### Argir: Jørð til sølu



Millum Reynstún og dagstovnin. Umleið 5140m².
Matr.nr.4cl, 2506 m² - 4bs, 1340 m² og 4cm, 1294 m².
Liggur innanfyri A3-økið, til blandaða bústaða-og miðstaðarbygging hjá Havnar kommunu.
Jarðarstykkið liggur sera væl fyri við góðun útsýni yvir Havnina, og út á fjørðin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

### Tórshavn: Sethús við garasju til sølu



Háskúlavegur 9., Matr. nr.1013g, grundøki 560 m².
Húsini eru í tveimum hæddum tvær sjálvstøðugar íbúðir.
Hvør hæddin uml. 84m² + garasja og úthús.
Stovuhæddin: Gong, køkur, stova, wc/baðirúm, hjúnarúm, og 1 kamar. Frá stovuni er stór altan.
Kjallarahæddin, gong, køkur, stova, 1 kamar, hjúnarúm, wc/bað beinleiðis frá hjúnarúminum, kjallari/vaskirúm og wc.
Frá kjallarahæddini gongur tú beinleiðis út í garasjuna.
Stórt ovastaloft við trappu upp, gott til goymslu. Húsini bygd í 1950, umvæld í 70'inum aftaná brandskaða. Hava stoypta grund og jarn klædning.Tey flestu vindeyguni eru góð, takið nýtt. Húsini liggja í Hornabø, 10. min.til gongu frá miðbýnum. Hava gott útsýni, stóran hugnaligan garð um húsini við runnum og góðum sólargangi.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

### Tórshavn: Hús miðskeiðis í býnum til sølu



Niels Finsens gøtu 47, matr.nr. 766a, grundøki 86 m².
Húsini eru samanbygd við grannahúsið og eru í trimum hæddum, 9x11 alin, bygd 1913.
Miðhædd: gong,køkur,stova/spísistova í einum.
Loftshædd: gong, hjúnarúm, 2 kømur og baðirúm/wc.
Kjallarahæddin hevur stoypt gólv, og ikki innrættaður.
Húsini eru í góðum standi, nýtt tak, vindeygu, ketil og oljufýr.
Húsini liggja friðaligt og hava gott útsýni.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

### Eiði:Sethús til sølu



matr. nr.495, grundøki 621m².
Húsini eru bygd 1985, stoypt og klødd við timbur í tveimum hæddum, íalt umleið 200 m².
Bilhús er bygt fast í húsini og er 54 m².
Á Stovuhæddini: durur, gong, køkur,stova, fýrrúm/vaskirúm og innrættað rúm til hárfríðkanarstovu, klárt at taka í nýtslu um møguligur keypari ynskir at arbeiða heima ella leiga út til onnur.
Á loftshæddini: gong, brúsa/wc, 4 kømur, hjúnarúm við egnum bað/wc.
Húsini liggja uppi á Kolli og hava vakurt útsýni.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

---

## Sermerkt hús í Norðragøtu til sølu

ADVOKATVIRKIÐ

Um hóskandi boð fæst, verður ognin Torbjarnargøta 1, Norðragøta seld

Húsini eru 180 m2 í forskotnum hæddum og eru innrættað við køki, 2 stovum, 4 kømurum, gesta wc og baðiverilsi uppiá og stórum kamari, gongd, baðiverilsi og trappuuppgongd umframt vaskirúmi og garagu niðriundir. Stór træterassa er. Byggiár: 2003
Grundøkið er 710 m2 við góðum útsýni.

Boð undir 1,6 mió. kr. ongan áhuga.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.

SKRIVSTOVUSAMSTARV
**ADVOKATVIRKIÐ**
Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · FO-110 Tórshavn
Tel 312227 · Fax 312241
e-mail: jus@post.olivant.fo
telefontíð kl. 10-12 & 14-16 / fríggjdag 13-15

---

## Kømur ynskjast til leigu

Nordjobb Føroyar ynskir fylgjandi kømur til leigu í Havnini:

4 kømur frá 2. juni og fram til 4. august.

Áhugaði kunnu ringja tlf. 257406.

Nordjobb er stovnur undir Foreningen Norden og hevur til endamáls at økja um vitanina um Norðurlond, við at skaffa ungum millum 18 og 27 ár summararbeiði í einum øðrum norðurlandi enn tey eru borgarar í.

**www.nordjobb.net.**

---

## Hús í Norðdepli til sølu

Matr. nr. 42a í Norðdepli
Grundøki: uml. 520 m²
Húsini: tvær hæddir á 70 m² hvør

Hetta eru betonghús klædd við timbur.
Húsini liggja mitt í bygdini og verða seld um hóskandi boð fæst.

**Nærri upplýsingar á tel 45 77 91**

---

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

---

HESTPRENT · TEL. 314 555



Finn dreymahúsið í Sosialinum